# HAPPING

*Skúlin á Fløtum*

Happing er, at ein bólkur ella einstaklingur leggur eftir onkrum og roynir at halda viðkomandi uttanfyri.

**Happing kann vera :**

- munnlig ( eyknevni o.a....)
- sosial ( ikki sleppa uppí, vera frystur úti, klikur o.a....)
- sálarlig ( t.d. vera noydd/ur til eitthvørt, hótt/ur til eitthvørt, vera argað/ur við útsjóndini ella háðað/ur gjøgnum sms – boð)
- likamlig ( vera sligin ella sparkaður)
- materiell (tað, sum ein eigur, verður oyðilagt)

**Verður eitt barn happað, kunnu vit ofta síggja hesi eyðkenni:**

- tunglyndi
- illsinni, stillføri
- varsemi, viðkvæmi, ótti
- vantandi bindindi
- lítið sjálvsálit
- skiftandi skúlaavrik
- vantadi hugur at tosa um skúlan

- ongar vinir

**Gongur long tíð kann barnið fáa:**

- vánaliga ella vantandi sosial samskipan
- vantandi sjálvsvirði og sjálvsálit
- trupulleikar við at knýta samband við onnur

**Hvussu kunnu vit staðfesta, um happing fer fram?**

Í nógvum førum kann vera rættiliga trupult hjá starvsfólki at gerast varugur við, at happing fer fram.

Skal nakað munagott gerast við hetta, er neyðugt at hava arbeiðsamboð til taks.

Vit hava góðar royndir við næmingasamrøðum. Gjøgnum samrøður við hvønn einasta næming, fæst ein rættiliga greið mynd av, hvussu flokkurin er settur saman og virkar, serliga tá hugsað verður um trivnað og sosiala samveru.

Við hesum grundarlagi kunnu næmingar og lærarar í felag virka fyri, at trivnaðurin og sosiala samveran í flokkinum hava góð kor, soleiðis at happing á ongan hátt gagnar nøkrum, og at

eingin í flokkinum tekur undir við at happa, og at eingin tí verður happaður.

**Hvat er neyðugt, um happing í skúlanum skal steðga?**

1. **virkisfús starvsfólk**
2. **virkisfýsnir næmingar**
3. **ábyrgdarfull foreldur**